


*Nr. 19* *16. september 2018* *78. árg.*

# Guds markleysa náði

*Men Móses segði: „Lat meg tó síggja dýrd tína." Harrin svaraði: „Eg skal fara fram við tær í allari dýrd míni og nevna Harran við navni fyri tær; tí at øllum , sum eg vil, veiti eg náði og miskunn."* *2. Mós. 33,18–19.*

Hvussu leingi varar Guds miskunn, og hvørja orsøk hevur hann til at halda út við okkum? Gud hevur í orði sínum sagt, hvussu vit skulu liva. Men vit svíkja vilja hansara og gera og siga slíkt, sum vit vita, ikki er eftir vilja hansara. So við og við eiga vit ongar umberingar eftir, og vit fáa færri og færri frágreiðingar um, hví vit svíkja í tí, sum vit vita er Guds vilji.

Móses var ógvuliga vónbrotin av fólki sínum. Á ferðini móti tí lovaða landinum høvdu tey svikið so dyggiliga. Meðan Móses var uppi á Sinaifjalli at taka ímóti steintalvunum við Guds boðum, dansaði fólkið um gullkálvin. Tey áttu at vitað, at slíkt var ein stór vanvirðing av Gudi – at taka ein deyðan gullkálv fram um HARRAN.

Móses mátti hava trygd fyri, at Gud kortini vildi verða verandi hjá teimum, og hann bønaði um at fáa eitt týðiligt tekin um tað. Hann bað um at sleppa at síggja ein farra av Guds dýrd sum tekin um, at øll vón ikki var uppi fyri fólkinum. Sum svar fekk hann lyfti um, at Gud vildi vera í ferðini við teimum og framvegis vildi vísa fólkinum náði og miskunn. Grundgevingin er sera týdningarmikil. Hon skuldi ikki vera at finna í lýdni fólksins og evnum til at fylgja boðum, men í at Gud vísir teimum náði – ***hann vísir teimum náði.*** Grundgevingina

finnur Gud hjá sær sjálvum, í sínum egna vilja at vísa náði og miskunn óheft av teimum, sum hann vísir hana.

Eisini vit eru bundin at eini náði og miskunn, sum vit ikki hava uppiborið. Skulu vit náa fram til dýrdina, sum Gud hevur lovað okkum, eru vit bundin av, at hann hjá sær sjálvum finnur orsøkina til at føra okkum fram. Tað ger Hann, og tað hevur hann víst okkum í Jesusi Kristi.

# Er pápi tín heima?

„Er pápi tín heima?“ spurdi eg einaferð ein lítlan drong, sum sat uttan fyri hurðina hjá lækna mínum. „Nei,“ svaraði hann.

„Veitst tú, hvar eg kann hitta hann?“ spurdi eg. Drongurin sat eina løtu og hugsaði, áðrenn hann svaraði. „Tú mást leita eftir honum hjá onkrum sjúkum ella særdum ella onkrum tílíkum. Eg veit ikki, hvar hann er, men hann er onkustaðni, har teimum tørvar hjálp.“

Eftir hetta svarið vendi eg mær á. Hetta var ein av størstu boðskapunum, eg hevði hoyrt í lívi mínum. Eg stóð so undarliga nakin og hjálparleysur, og innast inni hugsaði eg: Hugsa tær, um tað kann sigast um meg, einaferð tá ið eg ikki eri á jørðini longur: Hann er einastaðni, har onkur hevur hjálp hansara fyri neyðini.

Lat meg viðganga, at júst eg, ið skrivi hesar reglur, so mangan hugsi, at eg havi hjálp fyri neyðini. Eg ynski, at onnur skulu hjálpa mær.

Men hin vegin skortar ofta upp á mín vilja til at hjálpa øðrum.

Kortini hevði tað helst heldur ikki verið so gott, um eg var nøgdur við meg sjálvan. Tað verður ivaleyst ongin okkara, tí vit liva júst í einum heimi, sum er í neyð, og sum hevur hjálp fyri neyðini hvønn dag.

Mátti Harrin hjálpt okkum at rætt okkara neyðstøddu brøðrum og systrum eina hjálpandi hond við rætta sinnalagnum.

*A.J.*

---

Grøðing fer ikki fram automatiskt, sjálvvirkandi. Vit mugu biðja um grøðing fyri at verða grødd. „Tit hava ikki, av tí at tit biðja ikki.“ Ják. 4,2. *e.c.* ums.

# Brúdleypið hjá kongssoninum

*Og Jesus tók til orða og talaði aftur til teirra í líknilsum og segði: „Himmiríkið er líkt einum kongi, sum gjørdi brúdleyp hjá soni sínum.“ (Matt. 22,1–10).*

Tað liggur eitt so hátíðarligt yvir hesum líknilsinum, og eisini í øðrum førum hevur Jesus lagt serligan hátíðarljóma yvir tær myndirnar, sum verða líknaðar við Guds ríki.

Hetta er ikki eitt vanligt brúdleyp hjá einum kongssyni. Alt hitt dýrdarríkasta og besta, sum kundi koma fram í einum brúdleypi, er tikið við her. Stórar fyrireikingar, glaðir gestir, framúr brúdleypsmatur, vakrir búnar, tænarar og ovurnógvar innbjóðingar, og so serliga brúðarparið.

Jú, av sonnum hátíðardámur er yvir hesi myndini. Tey menniskju, sum halda, at í Guds ríki er ongin gleði og ongin dýrd, mugu broyta hugsan sína. Men hesi hátíð og gleði fær ongin lut í, uttan at verða boðin og tekur ímóti innbjóðingini.

Tú ert boðin til hesa hátíðina, fyri tær er fyrireikaður sessur við heiðursborðið. Kom, tí at alt er tilgjørt! Gud væntar, at tú kemur. Vónbrót hann ikki! Kom! Gleð teg í dag um innbjóðingina, og tú kanst hjartaliga bjóða øðrum við til hátíðina. Fleiri, tess betri! Kom, tí at nú er alt tilgjørt.

*t.* týddi.

# Frukt ella bara bløð

*„...Jesus... fann einki á tí (fikutrænum) uttan ber bløð.“ Matt. 21,19.*

Bíblian sigur: „Men tá ið hann, um morgunin fór inn aftur í staðin, kendi hann sær svongd. Og av tí at hann sá eitt fikutræ við vegin, gekk hann at tí, men fann einki á tí uttan ber bløð. Og hann sigur við tað: „Onga tíð á ævini komi frukt av tær meira!“ Og í stundini følnaði fikutræið.“ (vers 18–19).

Kanska heldur tú, at hatta var rættiliga ógvisligt. Træið hevði hóast alt onga skuld í, at tað ongar fikur hevði. Hví bannaði Jesus tað so? Svarið finnur tú í hesum orðunum: „Sí, fruktin

á fikutrænum kemur samstundis sum bløðini.“ Tá ið Jesus sá bløðini á trænum, hevði hann rætt til eisini at vænta frukt. Og tá ið eingin var, bannaði hann tað, tí tað var falskt og lætst, sum var hetta hin ektaða vøran.

Her hava vit øll okkurt at læra. Ansa eftir, at tú ikki vísir eina tignarliga rúgvu av bløðum uttan at bera rætta frukt. Tað skal meira til enn eitt klistrimerki á bili tínum, eitt Jesus-bringumerki á tínum jakka, og ein stór Bíblia undir arminum at ávirka og vinna onnur menniskju fyri Kristus.

Bíblian sigur: „Men ávøkstur (frukt) andans er: kærleiki, gleði, friður, langmóð, mildi, góðvild, trúskapur, spakføri, fráhald.“ Gal. 5,22. Hatta slagið av frukt kunnu onnur fólk síggja, nema við, smakka og gleða seg yvir. Og tað er hatta slagið av frukt, Gud ynskir skal geva seg til kennar í lívi tínum í dag.

„...et Ord til Dagen“
*Effie Campbell* umsetti.

# Hjálp fyri tað ónda hjartað

Tá ið seinni heimsbardagi var av, var nógv, sum skuldi gerast upp. Seks milliónir av jødum vóru fyribeindir. Hvør hevði ábyrgdina? Hvussu skuldi rættvísi aftur koma til sín rætt?

Í Nürnberg í Týsklandi vóru rættargangir. Ein jødi fór frá húsum og í rættin at hoyra málsviðgerðina, har sakin móti einum av leiðarunum fyri útruddingini av jødunum, Adolf Eichmann, var viðgjørd. Jødin fór at gráta. Ein, sum sat undir liðini á honum, spurdi: „Tú mást vera so fullur av øði, at tú illa fært sitið í frið?“ Maðurin svarar stillisliga: „Nei, tað er ikki sinni. Tess longur eg siti her, tess meira haldi eg, at eg sjálvur havi eitt hjarta sum hansara.“

Tað er ein góður kunnleiki. Øll eru vit ónd og kunnu í givnum umstøðum fremja ræðuligar gerðir. Tess meiri tørvar okkum Guds náði og fyrigeving. Í Bíbliuni lesa vit: ***Álið sundur hjørtu tykkara og ikki klæði tykkara, og horvið aftur til Harrans, Guds tykkara, tí at hann er náðigur og mildur, tolinmóður og góðskuríkur.*** (Jóel 2,13).

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 20* *30. september 2018* *78. árg.*

# Bara ein lykil passar

Hvørt lás hevur sín serliga lykil. Soleiðis er eisini við Himmalinum. Einaferð stóð eg framman fyri einari læstari hurð á einum úthúsi, sum eg sjáldan plagi at vera í. Eg fekk ikki lykilin at passa, so eg fekk læst hurðina upp. Hetta undraði meg, til tað rann fram fyri meg, at eg skifti lásið út í fjør, tí tað riggaði ikki. Eg mátti tí fáa fatur í einum øðrum lykli, og tá ið eg fann hann, var ongin trupulleiki at fáa hurðina upp.

Tað er praktiskt, at tað er soleiðis, at bara ein lykil passar til lásið. Sostatt eru tað bara tey, sum vit sjálvi loyva tað, sum sleppa inn í hús okkara og bil, ella hvat ið tað nú annars er, sum vit hava læst av.

### *Lykilin á krossinum:*

Á sama hátt er tað við Himmalinum: Har er bara ein lykil, sum passar. Tað er lykilin Jesus Kristus! Hann leið deyðan okkara vegna. Hann varð hongdur á ein kross og mátti útstanda ræðuligastu pínslur fyri okkara skyld. Alt samalt hendi, tí Jesus tók ímóti Guds revsing fyri alt tað skeiva, sum vit hava gjørt. Tí eru vit frí, og um vit halda okkum til hansara, hava vit fría atgongd til Guds ríki. Tað er heilt ótrúligt og kann ikki sammetast við nakað annað. Men latið okkum minnast til, at tað ikki eru aðrir vegir ella møguleikar at koma hagar, enn at nýta Jesus sum lykil. Í navni hansara er frelsa fyri ein og hvønn, sum vil taka ímóti! Tí eru viðurskifti okkara við hann so týdningarmikil.

# Vár Gud er føst og haldgóð borg

Ein av teimum sálmunum í Gamla Testamenti, sum allartryggast sigur frá, er 46. Sálmur. Hann byrjar við orðunum: „Gud er okkum vernd og verja, ein hjálp í trongdum, ið aldri svíkur." Og so hevur hann, eins og vit viðhvørt hava í songum okkara, eitt niðurlag, við tað, at tað viðhvørt ljóðar: „Herskaranna Gud, Jákups Gud, er vár fasta borg."

Hesi bíbliuorðini hava kveikt Luther at skriva dygdarsálmin: „Vár Gud er føst og haldgóð borg." Ein borg! Tað er júst myndin av hinum stóra tryggleikanum. Tær gomlu borgirnar eru bygdar soleiðis, at tær góvu bestu vernd og verju. Tá ið ein tílík borg júkkar múrar, djúpar borgargryvjur og høg torn, so høvdu tey í gomlum døgum alrabestu vernd og verju, sum hugsast kundi.

Og so er tað, at hitt gamla sálmaskaldið – og eisini Luther – boðar okkum: tílík borg er Gud. Og vit kunnu leggja afturat, at tílík borg er Gud enn á døgum, tó at tílíkar gamlar borgir ikki longur eru trygg vernd og verja, tá ið hugsað verður um hini nýggju vápnini, sum londini eiga nú á døgum.

Hin andligi veruleikin er tó hin sami enn sum fyri túsundum árum síðani, tá ið 46. Sálmur varð yrktur, og fyri fleiri hundrað árum síðani, tá ið Luther yrkti sín sálm. Gud er føst og haldgóð borg, sum ongin fíggindi megnar at renna um koll. Hann er hin trygga verndin og verjan í øllum vanda.

Tað er hesin veldugi boðskapurin um Gud, sum vernd og verju okkara, ein hjálp í trongdum, at tað stendur skrivað: „Tí óttast vit ei." Talan er um allan ótta. Guds børn kunnu sannroyna sum ein undursaman veruleika orðini í einum songi: „Hvør ofta í lívi meg vardi mín borg, tá ið neyðin var stór, og eg fekk troyst í sorg."

Í øllum trongdum og mótburði er Gud okkara vernd og verja, okkara fasta og haldgóða borg. Og størst av øllum: vit sleppa at seta alt okkara álit á Gud, soleiðis sum Lina Sandell syngur:

***„Hans náði leiðir meg altíð her.***
***og eg skal liva ævigt har***
***í hini somu náði."***

*t.* týddi.

# Gud trýr ikki upp á meg

Eg hoyrdi einaferð eina frásøgn um ein ungan russiskan vísindamann, sum í eini samrøðu við ein prest greiddi frá, at hann var ateistur og tí ikki trúði á Gud. Presturin svaraði honum: „Tað ger onki, tí hann trýr upp á teg.

Eg havi fleiri ferðir hugsað um, hvat tað kann vera, sum Gud trýr uppá hjá mær? Er tað mín góði vilji? Eru tað míni góðu evnir at vísa honum álit? Er tað góðskan, sum liggur í hjartadýpi mínum?

Har afturímóti eri eg ikki í iva um, at Gud elskar meg. Ikki tí at eg eri so serliga verdur at elska.

Ikki tí at eg eri góður ella á annan hátt kann løna honum kærleika hansara. Ikki tí at eg ikki fari at svíkja hann aftur og aftur. Men tí at hann hevur valt meg og ikki vil umvera meg. Tí hann hevur gjørt av, at eg skal hoyra honum til og vera barn hansara. Tí at hann er ein miskunnsamur Gud, sum elskar síni mannabørn treytaleyst.

Tað er júst, tí Gud ikki trýr á meg, at hann sendi Jesus til jarðar. Jesus kom fyri at rudda upp í viðurskiftum mínum við Gud, og tað gjørdi hann, tí hann veit, at hann ikki kann líta á hvørki míni evnir ella góða vilja, at hann ofrar lív sítt fyri meg. At hann sjálvur tekur skuld mína og ber revsingina fyri mítt miseydnaða og ótrúgva lív.

Gud trýr ikki á meg. Tað er mín bjarging og mín frelsa. Tí í staðin má eg trúgva á hann. Trúgva á, at hann er at líta á og ikki svíkur tann kærleikan, hann vísir mær.

## Bøn

Góði Gud. Takk fyri, at tú elskar meg og hevur gjørt av, at eg skal hoyra tær til. Hjálp mær nú at trúgva á teg.

---

Ikki stúra so nógv. Minst til, at tú skalt ikki megna eitt heilt tíðarskeið í senn. Tú skalt bara megna ein dag í senn, og Guds náði er nýggj á hvørjum morgni. Gloym tað, sum liggur aftan fyri teg, og strekk teg út eftir tí, sum liggur fyri framman. (Fil. 3,12-14).

*e.c.* ums.

# Runt jørðina eftir einum sekundi

Ártúsundir áðrenn alnótin var til, hevur borið til at senda alt møguligt kring jørðina eftir einum sekundi.

Tá ið eg byrjaði at læra Gud at kenna, hevði eg nógvar spurningar at seta kristindóminum. Til dømis søgdu mínir kristnu vinir, at teir bóðu til Guds fyri øðrum menniskjum. „Nå,“ segði eg, „og hvat hendir við tí?“ Teir søgdu, at alt møguligt kundi henda. Kanska gav Gud viðkomandi ugga, ella sendi ein eingil at verja viðkomandi – ella grøddi. Eg skilti ikki rættiliga, hvat tey tosaðu um.

**Onki er ómøguligt hjá Gudi!**

Við árunum havi eg sjálvur upplivað hetta, so nú trúgvi eg tí. Og fyri meg er tað heilt logiskt. Trýrt tú á Gud, so trýrt tú, at onki er ómøguligt hjá honum. Hann er allastaðni í senn. So sjálvandi kann eg sita í Føroyum og biðja hann hjálpa niðri í Afrika, og hann ger tað beinanvegin. Vit kunnu alla tíðina stuðla hvør annan um allan heim við allari møguligari hjálp og vegleiðing. Alt tað, sum Bíblian kallar „Guds signing.“

Tað er framvegis mangt viðvíkjandi tí at biðja Gud hjálpa øðrum, sum eg ikki skilji. Til dømis hví hann stundum handlar heilt ítøkiliga, og til aðrar tíðir eftir øllum at døma als ikki ger nakað. Men soleiðis er við allari bøn. Vit kunnu ikki síggja út yvir Guds tankar og ætlanir. Men vit mugu trúgva, at hann altíð er tann sterkasti og klókasti og fyltur við kærleika. Eisini tá ið vit biðja fyri øllum heiminum.

---

## Himmalskir bústaðir

Jesus segði: „Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir. Var tað ikki so, hevði eg sagt tykkum tað; tí at eg fari burtur at tilbúgva stað fyri tykkum.“ Jóh. 14,2. Húsini uppi í himli, sum vit fáa, eru nakað fín, tí nú hevur hann arbeitt upp á tey í so mong ár, og so var hann jú eisini træsmiður, tá ið hann var her niðri á jørð. *e.c.* ums.

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74